# Seks heimleysir flokkar

**Komandi skúlaár verða heili seks flokkar í Tórshavnar Kommunuskúla uttan heimastovu. Plásstrotið er stórt, og at ætlaði skúlabygningurin ikki verður liðugur 1. desember sum ætlað, ger málið bara verri**

SKÚLI
*Ingrid Bjarnastein*



*Kommunuskúlin skuldi 1. desember í ár fáa nýggjan bygning til fyrsta og annan flokk. Men av tí, at útbyggingin nú er steðgað, verður plásstrotið komandi skúlaár uppaftur størri enn væntað*

– Vit hava fingið at vita, at útbyggingin fer helst at taka eitt sindur longri tíð enn ætlað, tí nú er alt ikki heilt í lagi við byggingini, sigur Hanus Joensen, skúlastjóri í Tórshavnar Kommunuskúla.

– Hetta kann tykjast sum ein øvugt mannagongd.

Plásstrotið á Kommunuskúlanum er stórt. Komandi skúlaár verða tað heili seks flokkar, sum ikki fara at hava eina heimastovu. Men samstarvið við Tilhaldið fer at halda fram, sigur Hanus Joensen.

– Vit hava eina avtalu um, at tveir flokkar sleppa at vera har niðri inntil skúlin er liðugur útbygdur. Og nú verður taðhelst longri enn ætlað. Tað er ein trupulleiki, men tað ber til at strekkja tolið, tá ein veit, at tað verður gott, tá alt er liðugt.

Hanus Joensen sigur, at tíðin komandi árið á skúlanum verður stríggin, tí sera trongligt er inni. 600 næmingar koma at ganga í Tórshavnar Kommunuskúla komandi skúlaár.

– Hesi børnini koma nú heldur ikki úr bláari luft. Vit hava vita av tí leingi. Skúlarnir eru allir fullir í býnum, og tað er torført at finna pláss.

Hanus Joensen sigur tó, at umstøðurnar í tilhaldinum eru hampuligar og ein kann liva við teimum, men leggur tó dent á, at tað er nú einaferð bara í eina avmarkaða tíð.

– Tey hava Grasagarð, har tey kunnu vera í fríkorterinum. Skúli var jú í tilhaldinum í síni tíð, men stovurnar eru smáar. Annar a og annar b eru niðri í Tilhaldinum í løtuni, men enn er ikki avgjørt, hvør skal oman har komandi skúlaár.

# Nýggj nevnd í Føroya Blaðmannafelag

**Leygardagin hevði Føroya Blaðmannafelag aðalfund. Nýggj nevnd er vald, og eisini hevur felagið fingið nýggjan formann**

AÐALFUNDUR
*Ingrid Bjarnastein*

Føroya Blaðmannafelag hevði leygardagin aðalfund í Hornahúsunum í Havn. Formaðurin tvey tey seinastu árini, Jústinus Ejdesgaard legði frá sær, og skuldi eisini nýggj nevnd veljast.

Bara eitt uppskot til nýggjan formann var, og var tað Edvard Joensen. Hann var eisini valdur, og í nevndina komu Ingolf Olsen og Bjørt Samuelsen, meðan tiltakslimirnir eru Kalmar Lindenskov og Helgi Jacobsen. Øll nevndin er nývald.



*Edvard Joensen er nýggjur formaður í Føroya Blaðmannafelag*

# Razz hevur barnadiskotek

**Sunnudagin 9. mars fer danska barnastjørnan Razz at hava barnadiskotek í Føroyum. Hann fer at upptraðka bæði í Havn og í Fuglafirði. Razz er kendur í Danmark fyri at vinna bæði tað danska og tað norðurlendska barnagrandprixið**

BARNASTJØRNA
*Ingrid Bjarnastein*



13 ára gamli Rasmus, ella Razz, sum hann verður kallaður, fer nú at leita vegin fram til Føroya. Hann gjørdist av álvara kendur í Danmark seinasta ár, tá hann vann bæði tað danska og tað norðurlendska barnagrandprixið.

Sunnudagin tann 9. mars bjóðar Razz, sum bæði rappar og syngur, øllum føroyskum børnum í barnadiskotek. Razz fer tá á pall í Platform í Havn og í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Hetta er fyrsta ferðin 13 ára gamli danin er í Føroyum.

Barnastjørnan hevur eisini eina fløgu klára við 14 løgum. Sagt verður, at fløgan inniheldur øll møgulig tónleikasløg.

Longu áðrenn barnagrandprixið hevði Razz verið í fýra sjónvarpssendingum, har hann upptraðkaði bæði sum Michael Jackson og Elvis.

Lagið, sum hann vann Grand Prixið við, Kickflipper, hevur selt umleið 90.000 fløgur við fyrstu fløguni við sama navni.

Nú gevur unglingin næstu fløguna út. Hon eitur »Kast dine hænder op«.



# Høgni Hoydal manar spøkilsi aftur í jørðina

**– Eg kann veita fulla vissu fyri, at ongin sum helst ætlan er um at leggja fólkaskúlan undir kommunurnar at umsita, sigur Høgni Hoydal, sum umsitur Kommunumál í Landsstýrinum**

SKÚLAMÁL
*Áki Bertholdsen*



*– Fyrrenn vit vita, hvussu royndin hepnast at leggja eldraøkið undir kommunurnar at umsita, verður ongin støða tikin til at leggja onnur málsøki undir kommunurnar yvirhøvur*

– Tað er ongin sum helst ætlan yvirhøvur um at leggja fólkaskúlan undir kommunurnar at umsita.

Høgni Hoydal, landsstýrismaður í kommunumálum afturvísir upp á tað harðasta, at ætlanin er at leggja fólkaskúlan undir kommunurnar at umsita.

Hann hevur eisini hoyrt søgur um, at ætanin er at leggja fólkaskúlan undir kommunurnar at umsita, men hann veit ikki, hvussu hesar søgurnar eru íkomnar.

Tí hann leggur dent á, at tað er als onki í teimum. Hann sigur, at tað er ongin loyna, at Landsstýrið arbeiðir fyri, at leggja fleiri málsøki út til kommunurnar at umsita.

– Tað er okkara heilt greiði politikkur, at fleiri øki skulu leggjast undir kommunurnar at umsita. Men tað skal vera fult samsvar ímillum fíggjarliga ábyrgd og avgerðarrættin. Tað er eisini heilt greitt, at frá fyrsta degi skulu umboð fyri kommunurnar vera við í arbeiðum.

Landsstýrismaðurin sigur, at tað er eisini tann heilt greiði politikkurin, at kommunurnar skulu ikki tvingast at leggja saman við lóg.

– Vit leggja ábyrgdarøki út til kommunurnar og so mugu tær sjálvar finna út av at samstarva um at umsita hesi økini.

### Eldraøkið brúkast til barometur

Spurningurin er so, hvørji øki skulu leggjast undir kommunurnar at umsita?

Høgni Hoydal sigur, at fleiri álit eru gjørd um, hvørji øki kunnu leggjast undir kommunurnar at umsita.

– Fyribils hava vit bara tikið avgerð um, at eldraøkið skal undir kommunurnar. Og fyrrenn vit vita, hvussu tann royndin hepnast, verður avgerð ikki tikin um nakað sum helst annað.

Hann sigur, at eldraøkið fer at seta stór krøv til umsitinginga hjá kommunum, tí tær skulu bæði hava fyrisiting, skipanir í sambandi við roknskap og lønarútgjaldingar o.s.fr.

– Eldraøkið er eitt stórt øki og tað er júst tí, at vit hava gjørt av at byrja við einum stórum øki, tí júst eitt stórt øki setir stór krøv til kommunurnar.

– Eldraøkið verður royndarsteinurin at vita, hvussu tað hepnast. Og tá ið vit hava fingið tað at hepnast, verður støða tikin til onnur øki.

Høgni Hoydal sigur, at hann hevur boðað frá, at ongin sum helst avgerð verður tikin um at leggja onnur øki undir kommunurnar at umsita, fyrrenn vit hava royndirnar frá eldraøkinum, tí júst eldraøkið fer at føra við sær, at kommunurnar fáa ein fyrisitingarligan førleika at umsita tey ymsu økini.

– Og tá hava vit heilt aðrar fortreytir at viðgera støðuna útfrá og tá kunnu vit viðgera støðuna utfrá ítøkiligum royndum.

– Men vit hava eisini boðað frá, at ongi øki eru útihýst frá at verða løgd undir kommunurnar at umsita og sostatt kunnu øll øki koma upp á tal.

– Sostatt er fólkaskúlin heldur ikki útihýstur frá at verða lagdur undir kommunurnar. Men tað er ikki tikin støða til tað yvirhøvur. Hann sigur, at í teimum álitum, sum eru gjørdar, stendur eisini fólkaskúlin nevndur sum eitt málsøki, ið kann verða lagd undir kommunurnar.

– Men fyrrenn vit vita, hvussu royndirnar av eldraøkinum verða, taka vit ikki støðu til nakað av hinum málunum, sum eru nevnd í álitunum.

### Mál skulu út

Høgni Hoydal sigur, at hansara prinsipilella meining er, at tey øki, sum snúgva seg um tænastur í nærsamfelagnum, eiga at verða løgd undir kommunurnar, tí tað hevur nærsamfelagið bestan kunnleikan um.

– Tað verður hesin hugburður, sum ger av, hvørji øki verða løgd undir kommunurnar og ikki, hvussu øki eitur.

– Men tað skal gerast eftir eini greiðari ætlan, har fíggjarlig ábyrgd og avgerðarrættur fylgist, so at onki samanbland verður ímillum land og kommunu.

Hann vísir á, at ímeðal eldraøkið var ein samanblanding av landi og kommunum, var tað forsømt so tað munar, tí alt ov lítið varð gjørt.

– Men síðani kommunurnar eru farnar at átaka sær ábyrgdina, er nógv hent og tað vísir, at kommunurnar eru nógv betri førar fyri at umsita tey málsøkini og at veita borgarunum eina nógv betri tænastu, enn hann hevði frammanundan.

# Skattalættin er kærkomin men krøvini verða tey somu

**– Lønarsamráðingar eru um at fáa rættvísa løn fyri arbeiðið, men skattalættin er nakað heilt annað, sigur formaðurin í Starvsmannafelagnum**

LØNARSAMRÁÐINGAR
*Áki Bertholdsen*



*Tað hevur onga ávirkan á formannin í Starvsmannafelagnum, at Karsten Hansen dyrgir eftir, at hann skal slaka í lønarkrøvunum afturfyri skattalættan, sum ætlanin er at seta í verk. Skattaløtti og lønarsamráðingar eru heilt hvør sítt mál, sigur Gunnleivur Dalsgarð*

Starvsmannafelagið heldur fast við, at tað fer ikki at ávirka lønarkrøvini í samráðingunum í heyst, at skatturin verður lækkaður.

Orðini frá Landsstýrismanninum í fíggjarmálum í Sosialinum í farnu viku um, at hann ivaðist ikki í, at skattalættin, sum ætlanin er seta í verk, fer at føra við sær, at lønarkrøvini fara at verða eitt sindur linari, enn tey annars høvdu verðið.

Men formaðurin í Starvsmannafelagnum endurtekur einaferð enn, at skattalættin fær onga sum helst ávirkan á lønarkrøvini.

– Eg taki skattalættan sum eitt tekin um, at Løgtingið hevur tikið ov nógv inn frá borgarunum og einki annað. Og tað er sjálvsagt kærkomið at fáa ein skattalætta.

– Men tað er ein spurningur um at blanda ymisk viðurskifti saman.

– Lønarsamráðingar hava onki við skattapolitikk at gera. Lønarsamráðingar snúgva seg um at fáa rættvísa løn fyri arbeiðið og onki annað.

Tí fer skattalættin ikki at ávirka lønarsamráðingarnar.

Annars er formaðurin í Starvsmannafelagnum ikki heilt vísur í, at skattalættin fer at geva so nógv, sum útrokningarnar hjá fíggjarmálaráðnum vísa, tí tað eru ymsar meiningar um tað.

Hann sigur, at hann fer ikki at gera viðmerkingar til tað, fyrrenn Starvsmannafelagið hevur gjørt sínar egnu útrokningar.

### Gongdin er móti brúkaragjøldum

Karsten Hansen er heldur ikki samdur í tí, sum fakfeløgini føra fram um, at brúkaragjøldini, sum eru sett í gildi, fara kanska at føra til enn størri lønarkrøv, tí hann heldur, at tað eru ongi brúkaragjøld sett í gildið uttan at sjónvarpsgjald og ferðaseðlaprísir eru hækkaðir, umframt okkurt annað - men at tað er ein avleiðing av, at lønirnar eru hækkaðar.

– Vit vita, at nøkur brúkaragjøld eru hækka. Men vit vita eisini, at politiski boðskapurin er, at fleiri og fleiri øki skulu privatiserast og tað fer at føra við sær fleiri brúkaragjøld. Tað er ein politiskur veruleiki, sum ikki ber til at burturforklárast.

Hetta fer at føra til, at gjøld, sum vit øll hava verið felags um umvegis skattin, nú skulu leggjast á hvønn einstakan av okkum.